

**ÓKEND BÝARMYND**

*Litføgur og sermerkt býartok eru vælkendar býarmyndir aðrastaðni og í summar verður eitt sovorðið kanska eisini kend býarmynd í Havn*

# Fyrsta tok í Føroyum til Havnar í summar

**NÝHUGSAN** Í vetur hevur Tórshavnar býráð ríkað okkum við skoytivøllinum í Skálatrøð og nú verður arbeitt við eini aðrari nýbrótandi ætlan fyri at ríka summarlívið í Havn

Áki Bertholdsen

Tað tók tey flestu á bóli, tá ið Sosialurin skrivaði í heyst, at Tórshavnar Býráð arbeiddi við eini ætlan um at fáa ein skoytuvøll til Havnar í vetur.

Tey flestu hildu, at hetta var eitt frískligt hugskot og nú, skoytivøllurin hevur verið í Skálatrøð í nakrar vikur, munnu sjálvt tær størstu ivandi sálirnar hava yvirgivið seg, tí skoytivøllurin hevur verið so væl vitjaður, at í gjár kundi Portalurin upplýsa, at heili 14 000 fólk hava nýtt høvi at finna sær jarnskoytrurnar fram og hava skreitt á vøllinum.

## Tok til Havnar

Og nú arbeiðir Tórshavnar Býráð við enn eini nýskapandi ætlan fyri at bøta um trivnaðin í høvuðsstaðnum og tað er eitt hugskot, sum ikki stendur aftanfyri hugskotið um skoytivøllin.

Og tað er at fáa eitt tok at koyra runt í havnargøtum við ferðafólki.

Tok, sum hesi eru vælkend býarmynd nógva staðni í útlondum, men tað er so aldrin roynt í Føroyum áður.

Mangan er talan um ógvuliga litføgur og sermerkt tok, sum vekja ikki sørt ans, har tey koma framvið.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, váttar, at hann er farin at kanna, um tað ber til at útvega eitt lítið býartok, sum kann koyra runt í Havnini í summar ferðafólki og havnarfólki.

Talan er sjálvandi ikki um jarnbreytartok, men um eitt tok á hjólum, har ein vognur við motori dregur nakrar tokvognar aftaná sær.

Eitt nú sigur hann, at tað kundi verið eitt frískligur táttur í ólavsøkuni at havt eitt tok sum hetta koyrandi runt í býnum.

## Rundferðir í Havn

Men hann hugsar sær, at eitt slíkt tok kann brúkast til skipaðar ferðir runt um í Havnini við kønum ferðaleiðarum, sum kann greiða ferðafólkinum frá um tey ymsu húsini, býlingarnar, staðarnøvnini og annars frá ymsum søgum í hesum sambandi.

Hann leggur afturat, at ætlanin er ikki at keypa eitt tok, men at leiga eitt, í hvussu so er í fyrstu syftu.

Hann leggur kortini dent á, at hetta er ikki eitt mál, sum upp á nakran máta er viðgjørt í býráðnum, tí enn er tað bara á kanningarstigi.

Men hann heldur eisini, at tað er rættast at taka handilslívið og ferðavinnuna í býnum við upp á ráð, áðrenn nøkur endalig avgerð verður tikin.

aki@sosialurin.fo

**Eitt stuttligt hugskot, sum ikki stendur aftanfyri skoytivøllin**

# Vil hvørki lova løgmanni pening ella stuðul

**TÆNASTUMANNAKANNING** Vil løgmaður hava tænastumannakanning, má hann finna peningin til tað innanfyri fyri karmarnar, tí tað skal ikki økja um útreiðslurnar hjá landskassanum, sigur Jørgen Niclasen

Áki Bertholdsen

Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins og formaður í fíggjarnevndini, vil ikki játta løgmanni eyka pengar til at seta tænastumannakanning í verk ímóti tveimum aðalstjórum, soleiðs sum løgmaður boðaði frá í morgun

Samstundis skal bráðfeingis løgfrøðingur setast á Skrásetingini at kanna eftir, um løggildingin kann takast frá nógv umrøddu grannskoðarunum.

Og Jørgen Niclasen vil heldur ikki lova løgmanni politiskan stuðul til at seta kanningina í verk.

Hann sigur, at higartil hevur fíggjarnevndin hildið fast um, at tá ið landsstýrið biðjur um eina eykajáttan til eitt endamál, skal tilsvarandi sparing finnast onkra aðrastaðni.

Og hann metir, at tað er eitt krav, sum fíggjarnevndin fer at halda fast um, sama hvat endamál, eykajáttanin skal brúkast til.

- So vil landsstýrið brúka pening upp á eina tænastumannakanning, má tað eisini finna útvegir fyri at spara pening á øðrum økjum.

Men hann leggur afturat, at fær fíggjarnevndin eina umsókn frá løgmanni í hesum sambandi, verður hon sjálvandi viðgjørd og í hesum sambandi verður so eisini kannað eftir, hvat kanningin kostar og, hvat fæst burturúr.

Óvist er, hvat ein slík tænastumanning kostar, men helst verður talan um milliónaupphædd, tí ein vanligur kanningarstjóri hevur kostað landskassanum fleiri hundraðtúsund krónur og ein tænastumannakanning er nógv meiri umfatandi.

Annars vísir Jørgen Niclasen eisini á, at tænastumannafelag Landsins hevur eisini ivast í grundarlagnum undir kanningini og tað er eisini ein spurningur, sum má viðgerast.

Hann vísir á, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur longu kannað málið og spurningurin er um møguligar niðurstøður ikki kundu verðið tiknar út frá tí, heldur enn at gera tvær kanningar afturat.

aki@sosialurin.fo